SERNÁMSDEPILIN

Endurlýsing:

## Samskipari í NSR tænastuni í Suðuroy

**Av tí at ov fáar umsóknir eru komnar til spennandi starv sum samskipari í nýstovnaðu NSR tænastuni í Suðuroy, verður lýst av nýggjum.**

**Førleikakrøv**
Útbúgvin lærari við arbeiðsroyndum. Fyrimun hevur lærari við leiðsluroyndum og viðkomandi eftirútbúgving.

**Høvuðsuppgávan**
At leiða og fordeila arbeiðið í tænastueindini og at vera tann, ið er andlitið úteftir.

Manningin í NSR tænastuni er ein samskipari, ein sálarfrøðingur og verandi serlærarar/ ráðgevar. Samskiparin hevur ein týðandi lut í hesum toymi, ið í samstarvi við Sernámsdepilin støðugt skal menna sernámsfrøðiliga virksemið.

***NSR tænastan*** fer at hava skrivstovur í Vági, men er tænasta fyri alla Suðuroy. NSR tænastan er eitt samtak ímillum Sernámsdepilin og kommunurnar í Suðuroy. Hon skal virka sum sjálvstøðugur stovnur undir Sernámsdeplinum og skal m. a.

- veita skúlum, stovnum, foreldrum og myndugleikum námsfrøðiliga- og sálarfrøðiliga ráðgeving.
- Skipa fyri skeiðum til starvsfólk og foreldur
- Skipa heildartilboð til næmingar við serligum tørvi
- Hava samstarv við barnaverndarstovu, heilsusystrar og sosialar myndugleikar

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314522/ 225803, e- mail: hanseli@snd.fo

Umsókn við avriti av próvskjølum v. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. september 2007.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

SERNÁMSDEPILIN

## Ráðgevandi fysioterapeutur

Í Sernámsdeplinum er eitt starv sum ráðgevandi fysioterapeutur leyst til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsstað**
Fysioterapeuturin hevur høvuðsarbeiðsstað í Sernámsdeplinum í Tórshavn, men er arbeiðsøkið kanning og ráðgeving viðv. børnum og ungum ( 0-18 ár ) kring alt landið.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan er í greiningararbeiði at skipa fyri rørsluligum kanningum av børnum og at luttaka í eygleiðing av børnum, ið eru undir kanning. At veita ráðgeving til stovnar, foreldur og tey, ið annars eru um børnini við fysiskum/ rørsluligum trupulleikum. Ein minni partur kann vera viðgerandi venjing. Arbeitt verður í samstarvi við H TM og Barnadeildina á LSH.

Ynskiligt er, at fysioterapeuturin kann standa fyri skeiðshaldi fyri starvsfólki og avvarðandi.

**Løn og arbeiðstíð**
Eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Fysioterapeutfelag Føroya. Arbeiðstíð, frítíð o.a. verður løgd til rættis í samráð við stjóran í Sernámsdeplinum.

Meira fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314522/ 225803.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi tann 3. september 2007.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

SERNÁMSDEPILIN

## Talilærari – ráðgevi í Norðoyum

Eitt starv sum ráðgevi og talilærari hjá børnum undir skúlaaldur í Norðoyum er leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Førleikakrav**
Lærari ella pedagogur við serlærara-útbúgving ella aðrari til sernámsfrøðiligt arbeiði førleikagevandi eftirútbúgving. Umsøkjari við sergrein í talu/hoyrn hevur fyrimun.

Umsøkjari má vera sinnaður at viðvirka í meningini av sernámsfrøðiliga virkseminum yvirhøvur. Eftir umstøðunum stuðlar Sernámsdepilin til skeiðluttøku o. a.

**Arbeiðstíð**
Í talilærara- ráðgevaarbeiðinum er fyribils talan um 14 pultstímar um vikuna. Í samráð við Sernámsdepilin, stovnar og skúlar verður annars talan um mennandi arbeiði við børnum við serligum tørvi og annað sernámsfrøðiligt virksemi.

Ætlandi fer starvið at fáa tilknýti til NSR- tænastuna, ið ætlanir eru um at stovnseta í Norðoyum. Í samráði ímillum Sernámsdepilin, umsøkjaran, ið verður settur og fakfelag hansara kunnu broytingar tá gerast viðv. uppgávum og starvstreytum.

**Løn**
Eftir sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali- hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. viðmæli skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi nánadagin 3. september.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

SERNÁMSDEPILIN

## Avloysari fyri talilærara

Vegna farloyvi skúlaárið 07/ 08 sóknast vit eftir talilærara skjótast til ber at veita taluvenjing og at virka í talumennandi arbeiði við børnum undir skúlaaldur. Í mestan mun at arbeiða við smáum talibólkum í Sernámsdeplinum, men onnur skipan kann eftir umstøðunum eisini koma fyri.Talan kann eisini vera um 2 parttíðarstørv.

**Førleikakrav**
Pedagogur ella lærari við serlærara-útbúgving ella á annan hátt útbúgvin/ eftirútbúgvin umsøkjari við royndum at arbeiða við smábørnum ,og sum hevur áhuga at talivenja við børnum og at luttaka í talimennandi arbeiði annars.

**Løn**
Eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag, lønarfl. 23 – 2 til 30 – 3.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. viðmælum eigur at vera Sernámsdeplinum í hendi tann 3. september 2007.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali – hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

Sosialurin
Sosialurin
i